gult2 cyan2 magenta2 svart2

Fólk við royndum fáa hægri tímaløn

Sáttmálin, sum Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag, skrivaðu undir síðstu nátt, er slóðbrótandi, tí nú fáa tey, sum hava royndir á einum arbeiðsplássi, hægri løn enn tey, sum lítlar, ella ongar royndir hava

SEMINGSUPPSKOT
Áki Bertholdsen

– Hesin sáttmálin er søguligur. Og tað eru vit fegin um.

Feløgini, sum hava verið í verkfalli í næstan tríggjar vikur, gjørdi í hvussu so er eitt veruligt framstig í teirri semjuni, sum varð undirskrivað tíðliga í gjáramorgunin.

Og tað er, at nú fáa tey, sum hava royndir á einum arbeiðsplássi, hægri løn enn tey, sum lítlar, ella púra ongar royndir hava.

– Tað er nakað spildurnýtt í sáttmálum hjá tímaløntum, bæði í Føroyum og í øllum grannalondum okkara, uttan í Íslandi, og tí er hettta ein søgulig løta hjá føroysku arbeiðarafjøldini, sigur Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag.

Somu lønarhækking

Annars gevur semjan, sum nú er gjørd, limunum í Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag somnu lønarhækking, sum Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgini í Klaksvík fingu, tá ið tey skrivaðu undir nýggjan sáttmála, fyrst í mei.

Talan er um ein tvey ára sáttmála og 1 mei í ár hækkar grundlønin 4,24 krónur um tíman og 1. mei næsta ár, hækkar hon aftur 4,24 krónur um tíman.

Somuleiðis hækkar eftirlønin. Tann 1. mei í ár, hækkar eftirlønin 0,8% og 1. mei næsta ár, hækkar hon aftur 0,8%.

Yvirtíðin leygardag, frá kl. 8-24, verður 65%.

Annars verða áseting-arnar strikaðar fyri arbeiði á fiskavirkjum, sum varar styttri enn trý samdøgur. Tað vil siga, at verður arbeitt í vaktum, skal tað vera í minst trý samdøgur, annars, skal vanlig yvirtíð gjaldast.

Fáa tvær krónur afturat

Men afturat vanligu lønarhækkingini, fáa tey, sum hava trý ára starvstíð hjá sama arbeiðsgevara, eina eyka viðbót upp á eina krónu um tíman.

Tey, sum hava arbeitt í fimm ár hjá sama arbeiðsgevara, fáa eina krónu afturat, soleiðis at tey, sostatt fáa tvær krónur meiri um tíman, enn vanliga tímalønin er.

Við starvstíð er at skilja tann tíð, sum hevur verið í starvi hjá sama arbeiðsgevara. Tá virki skiftir eigara, skal starvstíðin hjá fyrrverandi eigarum teljast við í starvstíðina hjá nýggja eigaranum.

Hesar viðbøturnar fyri starvstíð koma partvís í gildi beinanvegin, tí hálv viðbót fyri trý ára starvstíð verður latin longu frá 1. mai í ár.

Tað vil siga, at tey, sum nú hava verið á sama arbeiðsplássi í trý ár, fáa eina eyka viðbót upp á 50 oyru um tíman frá 1. mei í ár at rokna.

Hjá teimum, sum hava verið trý ár á sama arbeiðsplássi, hækkar tímalønin 1. mei í ár sostatt fyrst 4,24 krónur í vanligari lønarhækking, men harumframt fáa tey 50 oyru í aldursviðbót. Hækkingin er sostatt 4,74 krónur um tíman tilsamans.

Næsta ár hendir onki, men full viðbót fyri trý ára starvstíð verður latin frá 1. mai 2003. Viðbótin fyri fimm ára starvstíð verður latin frá 1. mai 2005.

Tey, sum hava verið minst trý ár á sama arbeiðsplássi, fáa nú tvær lønarhækkingar frá 1. mei í ár. Fyrst fáa tey vanligu lønarhækkignina upp á 4,24 krónur um tíman. Men harumframt fáa tey eina aldursviðbót upp á 50 oyru um tíman. Lønarhækkingin er sostatt 4,74 krónur um tíman. Myndin er av samráðingunum mánanáttina.

Mynd: Jens Kr. Vang

Fólkið hevur verið heilt fantastiskt

– Arbeiðsfólkið kring landið hevur verið heilt fantastiskt at stuðla verkfallinum.

Ofta hevur leikað hart á, men tað rínur ikki við longur, sigur Ingeborg Vinther

SEMJA
Áki Bertholdsen

– Hevði tað ikki verið fyri tann ovurhonds stóra stuðulin, vit hava fingið, høvdu vit aldrin komið so frægt ígjøgnum verkfallið, sum vit komu.

Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag, sigur, at verkafólk kring landið, hava verið heilt fantastisk at stuðla verkfallinum.

– Tað hevur ikki verið nakar slingur í valsinum. Heilt norðast úr Norðoyggjum, til Sumbiar hava vit fingið fullan stuðul, og tað ger sjálvsagt, at tað er lættari at koma ígjøgnum.

Hon sigur, at allastaðni úr landinum eru fólk komin inn á meginøkið at standa verkfalsvaktir, eisini úr Suðuroynni. Samstundis hava eldri limir stákast innandura, har tey smurdu breyð, bakaðu og kókaðu drekka og annars fingist við fyrifallandi arbeiði.

– Høvdu øll hesi fólkini ikki tikið so væl undir við verkfallinum, hevði ikki so frægt komið burturúr, sum tað kom. Tað ger, at vit føla okkum sterk.

Annars sigur Ingeborg Vinther, at hon er so von við, at tað leikar hart á, og at ágangurin er stórur í eini verkfalsstøðu, at tað rínur ikki við longur.

– Sjálvandi leikaði hart á viðhvørt, men eg haldi, at vit høvdu tamarhald á støðuni alla tíðina.

Valdu at taka stríðið

Hon sigur, at tey valdu at tak hetta stríðið fyri at varðveita tey demokratisku rættindini, sum feløgini hava.

– Arbeiðsgevararnir hava ikki viljað samráðst út frá teimum krøvum, vit høvdu sett, men tað vóru teir so noyddir til at enda.

Annars hevur Ingeborg Vinther als ongar viðmerkingar til, at sáttmálin hjá Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag, aftur nú er øðrvísi enn sáttmálin hjá Havnar Arbeiðsmannafelag.

– Eg kann bara siga, at vit hava barst sjálvi fyri hvørjum komma í okkara sáttmála og tað hava vit tað gott við, sigur Ingeborg Vinther.

– Ofta leikaði hart á, men tann fantastiski stuðulin gjørdi, at vit føldu okkum sterk, sigur Ingeborg Vinther. Myndina tók Jens kr. Vang av samráðingunum á Hafnia mánanáttina

Lesið meira um semjuna á síðu 10

Silverline P130-51-L
við aluminiumshúsa
Pentium 4 1,3 GHz Geril • 128 MB RDRAM PC600 • • Brennari 8x8x32 • 40 GB harddisk • 32MB nVidia Geforce2 MX grafikkort v/TV out • 12xDVD drev við forritum, disklastað, 16 bit integreræð ljóðkort, standard hátalari **• 56K internt DATA/FAX riser modem • Microsoft Windows MILLENIUM DK • Microsoft Works Suite 2000*:** Word 2000, Works 2000, Encarta World Atlas 2000, Picture It! 2000, Autoroute Express 2000 **• Microsoft spæl** • Standard knappaborð • Wheel mús • 1 ára garanti • 17" skermur
Kr. 19.995,-

FUJITSU COMPUTERS SIEMENS
FÍGGING, DØMI:
Útgjald: 6.665
Rest yvir 12 mðr.:
1.229 um. mðn.
Rest yvir 18 mðr.:
852 um. mðn.
3 ár
ELECTRONIC
SMS · Tel 353537 · Fax 353536 · E-mail: electr@post.olivant.fo

gult3 cyan3 magenta3 svart3

Svarið er rætt

Runavíkar Skúli skipaði mánamorgunin fyri samkomu í samband við, at næmingar úr skúlanum vunnu spurnarkappingina millum framhaldsskúlarnar í landinum

SPURNARKAPPING
Edvard Joensen

Runavík: Tað flaggar uttan fyri skúlan í Runavík. Nógvir bilar standa á parkeringsplássinum, og væl av fólki er á gongd. Tey koma at heiðra tey, sum vunnu spurnarkappingina, sum verið hevur í Útvarpinum millum framhaldsdeildirnaar hjá føroysku skúlunum.

Væl av fólki var komið saman í skúlanum., Foreldur, næmingar, lærarar, býráðslimir og eisini onkur løgtingsmaður, legði leiðina framvið at ynskja tillukku.

Borð var sett upp fram við vegginum við rundstykkjum, kaffi og onkrum øðrum leskandi, sum fók fingu sær av.

Tey vistu væl, næmingarnir úr Runavíkar skúla. Vunnu kappingina annað árið á rað. Og tvey teirra vóru eisini við á liðnum, sum vann í fjør.

Men hetta er ikki fyrstu ferð, Runavíkar Skúli vinnur slíka kapping, greiðir skúlaleiðarin, Ingvard Lamhauge, frá. Í sekstiárunum var eisini slík kapping, og tá vann Runavíkar Skúli eisini tvær ferðir.

Samkoman í skúlanum mánamorgunin byrjaði við, at borgarstjórin, Rodmundur Nielsen, beyð vælkomin. Hann lat síðan orðið til landsstýrismannin við mentamálum, Torbjørn Jacobsen.

Men hann var so svangur, segði hann, at hann vildi hava kaffi og rundstykkir, áðrenn hann fór at tala.

Tá tað var fingið niðurum, helt Torbjørn eina av sínum eyðkendu røðum. Hann tók ríviliga til, og rósti næmingum og lærarum fyri eina góða og spennandi kapping.

Hann helt seg hava lagt merki til, at eitt evni, tey vóru eit sindur lakari í enn øðrum, var tað bókmentaliga. Tí hevði hann keypt teimum eina góða bók í part, sum han handaði sum gávu frá Undirvísingar- og Mentamálastýrinum.

Eisini Hans Petur Ellingsgaard, formaður í Mentanarnevnd Runavíkar Býráðs, helt røðu og takkaði teimum tirmum unglingunum, sum so virðiliga høvdu umboðað kommununa. Eisini hann handaði teimum gávur, eins og hann gav lærarunum, sum fylgt teimum hava alla kappingina, nøkur góð orð og eina gávu í part.

Tí, sum hann segði, er einki lið, sum klárar seg uttan góðan venjara.

At enda helt skúlaleiðarin í Runavíkar skúla, Ingvard Lamhauge, røðu vegna skúlan, har hann millum annað las upp heilsu, sum komin var frá Studentaskúlanum og HF Skeiðnum á Kambsdali, har tey ynsku tillukku. Eisini handaði skúlaleiðarin næmingum og lærarum gávur.

Poul Eli Olsen, Jens Dalsgaard, Margith Lamhauge, Ingvard Lamhauge, Tóri Højgaard og Hans Poulsen hava í felag mannað vinnaraliðið úr Runavíkar Skúla

Mynd: Edvard Joensen